Búskapur og vinna:

Løn og renta

Norski tjóðbankastjórin, Svein Gjedrem, ávaraði í einari røðu hóskvøldið vinnulívsfólk og politikarar um tær avleiðingar, sum kunnu standast av ov stórum lønarvøkstri á arbeiðsmarknaðinum.

Bankastjórin segði, at við einum lønarvøkstri upp á millum fýra og fimm prosent fer tað at bera til at halda inflatiónini niðan fyri 2,5 prosent, sum er málsetningurin. Men verður lønarvøksturin størri enn tað, fer tað at fáa avleiðingar.

Svein Gjedrem segði, at ov stórur lønarvøkstur fer at elva til hægri rentu og veksandi arbeiðsloysi, samstundis sum kappingarførið hjá norska ídnaðinum fer at versna. Hann hevur fyrr ávarað um, at íløgurnar í norska ídnaðinum fara at minka tey næstu árini.

Carlsberg gott ár

Tað gongur framvegis sera væl hjá stóru donsku bryggjarífyritøkuni Carlsberg. Roknskapurin fyri árið í fjør vísir, at fyritøkan hevði meiri enn 3,3 mia. krónur í avlopi áðrenn skatt, og tað er heili 48 prosent meiri enn í 2000, tá avlopið var góðar 2,2 mia. krónur.

Carlsberg seldi í fjør øl og sodavatn fyri 34,5 mia. krónur, og tað var umleið 9 mia. krónur meiri enn árið fyri. Leiðslan í fyritøkuni væntar, at framgongdin fer at standa við í ár.

Telenor met

Norska telefelagið Telenor hevði eitt metgott úrslit av rakstrinum í fjør. Sambært roknskapinum hevði felagið góðar 9 mia. krónur í avlopi. Tað er góðar 7 mia. króonur betri enn árið fyri og samstundis tað besta úrslitið, sum felagið nakrantíð hevur havt.

Tær vanligu inntøkurnar hjá Telenor vóru í fjør næstan 40 mia. krónur. Herumframt fekk felagið væl burturúr, tá tað seldi tvey av sínum dótturfeløgum.

UTTAN ÚR HEIMI

Irakskur bøðil í Danmark skal hjálpa USA

Fyri 13 árum síðani skipaði Nizar al-Khazraji fyri hópmorðinum, sum kostaði 180.000 kurdum í Irak lívið. Nú vil CIA hava hann at hjálpa sær at koyra Saddam Hussein frá

YVIRGANGUR
Árni Joensen

Tann 63 ára gamli generalurin og fyrrverandi ovasti í herleiðsluni hjá Saddam Hussein hevur búð í danska býnum Sorø seinastu tvey árini. Har er løgreglan á varðhaldi alt samdøgrið, samstundis sum danskir myndugleikar kanna, um hann er sekur í krígsbrotsverki.

Nú er so spurningurin, um hann yvirhøvur kemur fyri nakran danskan dómstól, tí amerikanska fregnartænastan CIA hevur brádliga fingið eygað á hann. CIA heldur, at tað ber til at fáa gagn burtur úr honum.

Tað vælvitandi arabiska blaðið Al-Hayat, sum kemur út í London, skrivar, at amerikanska stjórnin heldur Nizar al-Kharzraji vera tann best skikkaða til at taka við sum irakskur leiðari eftir Saddam Hussein. Blaðið sigur seg hava fingið at vita frá keldum í sýriska høvuðsstaðnum Damaskus, at amerikansku myndugleikarnir hava kannað 62 fyrrverandi irakskar heryvirmenn, sum búgva í útlegd, og at valið er fallið á tann 63 ára gamla fyrrverandi generalin.

Sambært blaðnum hevur CIA eisini fingið vissu fyri, at teir flestu felagsskapirnir hjá útlagnum irakum styðja al-Kharzraji, sum noyddist at flýggja úr Irak eftir ósemju við Saddam Hussein undir Flógvakrígnum.

Sjálvur hevur fyrrverandi generalurin greitt útvarpsstøðini Radio Free Iraq frá, at hann er til reiðar at standa á odda fyri einum kvetti ímóti Saddam Hussein, um USA skipar fyri tí.

Gjørdi eftir boðum

Í Danmark er Nizar al-Kharzraji alt annað er væl umtóktur. Nógvir danskir politikarar gjørdust í øðini, tá að seinasta heyrti frættist, at maðurin var komin til Danmarkar fyri tveimum árum síðani. Tað vísti seg, at loyniliga danska løgreglan vísti, at maðurin var í Danmark, men at hon hevði ikki kunnað teir ovastu myndugleikarnar um tað, fyrr enn maðurin hevði fingið fyribils uppihaldsloyvi.

Fyrrverandi generalurin var ovasti í iraksku herleiðsluni, og tað var hann, sum skipaði fyri hópmorðinum, tá 180.000 kurdar í Irak vórðu fyribeindir í 1988. Teir flestu vórðu eitraðir við gassi. Sjálvur sigur Nizar al-Kharzraji, at hann gjørdi bert tað, sum hann hevði fingið boð um at gera.

Síðani tað kom fram alment í Danmark, at maðurin býr í Sorø, hevur løgreglan staðið á varðhaldi við íbúð hansara alt samdøgrið, tí fyrrverandi generalurin vil vera við, at umboðsmenn hjá Saddam Hussein og útlagnir kurdar hava hótt við at beina fyri sær.

Úr Norðurlondum:

Danir endurnýta

Handlarnir í Danmark, sum selja brúktar lutir, hava góðar dagar. Fleiri felagsskapir so sum Kirkens Korshær og danski Reyði Krossur hava nógvar handlar, sum selja innbúgv, klæði, bøkur o. a., sum fólk lata inn í handlarnar. Reyði Krossur hevur í løtuni 166 handlar av hesum slagnum og Kirkens Korshær 150.

Men áhugin fyri teimum brúktu vørunum er so stórur, at Kirkens Korshær letur ein nýggjan handil upp um mánaðin, sigur leiðarin Torben Larsen. Og hetta loysir seg eisnini, tí í fjør høvdu handlarnir hjá teimum 30 mió. krónur í avlopi.

Kanningar vísa, at danir í at kalla øllum aldri keypa í endurnýtsluhandlunum. Tað vísir seg eisini, at nógv av teimum ungu keypa brúkt klæði, sum tey ofta halda vera spennandi samanborið við tann nýggja mótan. Eisini vísir tað seg, at innflytarar, sum vanliga ikki hava so nógvar pengar, keypa nógvar brúktar vørur.

Nógv keypa eisini bøkur. Nýggjar bøkur eru dýrar í Danmark, men í endurnýtsluhandlunum kanst tú fáa góðar bøkur fyri fimm ella tíggju krónur.

Sjey felagsskapir av ymiskum slagi hava endurnýtsluhandlar í Danmark, og tilsamans eru handlarnir meiri enn 600 í tali.

Misnøgdir pílagrímar myrdu ráðharra

Afghanskir pílagrímar vóru so uppøstir av at bíða eftir einum flogfari, at teir myrdu ráðharran í samferðslumálum

Summir pílagrímar hava sitið í floghavnini í Kabul í fleiri dagar og bíðað eftir at sleppa til Mekka

Mynd: Reuters

Teir umleið 1.000 pílagrímarnir hava sitið í floghavnini í Kabul seinastu dagarnar og bíðað eftir einum flogfari, sum skuldi flyta teir til heilaga býin Mekka í Saudiarabia.

Hósdagin bar ikki beinari á, enn at samferðslumálaráðharrin Abdul Rahman kom í floghavnina. Hann skuldi við einum flogfari til India, men pílagrímarnir vildu vera við, at ráðharrin hevði lagt hald á tað flogfarið, sum skuldi flyta teir til Mekka. Pílagrímarnir kringsettu ráðharran, og hóast lívverjarnir royndu at verja hann, fingu teir einki gjørt. Tám avtornaði, lá Abdul Rahman deyður á vøllinum.

Eygleiðarar í Kabul siga, at tilburðurin í floghavnini er eitt týðiligt tekin um, hvussu ótrygg viðurskiftini í Afghanmistan eru. Løgreglan var á staðnum, men fekk ikki forðað tí, sum hendi, og tað ljóðar, at menn altjóða friðarherdeildini eisini vóru har, men at teir heldur ikki fiongu forðað morðinum.

Eygleiða gestir

Tað hevur vakt ans, nú tað er komið fram, at norska løgreglan hevur hildið eygað við fólki, sum hava gist á hotellum í Finnmørkini.

Leiðslan í hotellketuni Rica váttar, at hon teir seinastu mánaðarnar hevur latið løgregluni yvirlit yvir gestirnar, sum hava gist á hotellunum. Løgregluovastin í Vesturfinnmørkini, Ernst Petersen, sigur, at teir halda seg hava rætt sambært útlendingalógini at halda eygað við hotellgestum sum lið í arbeiðinum at leita eftir útlendskum lógloysingum.

Clinton skal vitna

Fyrrverandi jugoslaviski forsetin, Slobodan Milosevic, segði á rættarfundinum í Haag í gjár, at hann fer at krevja fleiri vesturlendskar leiðarar at vitna í málinum. Milosevic nevndi fyrrverandi amerikanska forsetan, Bill Clinton, og fyrrverandi norska uttanríkisráðharran, Knut Erik Vollebæk, sum var formaður í evropsiska trygdar- og samstarvsfelagsskapinum, tá NATO leyp á Jugoslavia.

Fyrr hevur Milosevic sagt, at hann fer eisini at krevja franska forsetan Jacques Chirac at vitna.

Umvæla ísvirkið í Miðvági

Ísvirkið hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági verður umvælt fyri umleið eina hálva millión. Arbeiðið verður væntandi liðugt um mánaðarskiftið

FISKIVINNA
Edvard Joensen

Skipini, sum landa til Føroya Fiskavirking í Miðvági, hava ikki fingið ís frá virkinum síðan á nýggjárinum. Um mánaðarskiftið verður ísvirkið væntandi aftur í drift

Mynd: Edvard Joensen

Miðvági: Ísvirkið í Miðvági, sum hevur ligið stilt síðan á nýggjárinum, fer í gongd aftur um mánaðarskiftið.

– 17 ár hava sett síni spor, sigur Albert Ellefsen, virkisleiðari hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági, um ísvirkið.

Loft og veggir vóru slitin, og gamla metaltilfaið var farið at rusta, so ísurin var ikki tann besti.

Avgjørt varð tí at umvæla virkið. Veggirnir, sum eru av timbri, verða klæddir við glastrevjum, og alt, sum gjørt er av metalliið rustar, verður skift út við rustfrítt tilfar.

– Tað hevur verið krav leingi, sigur Albert Ellefsen, at hendan umvælingin skuldi gerast. Umvælingin, sum gjørd verður, fer at kosta umleið eina hálva millión krónur, sigur hann.

– Men so verður eisini friður komandi 25 árini, heldur virkisleiðarin.

Ísvirkið hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági klárar at gera 30 tons av ísi dagliga. Vanliga taka skip úr Vágum og Sandoynni ís í Miðvági. Eisini plaga skip aðrastaðni frá at taka ís her, greiðir Albert Ellefsen frá. Eitt nú línuskipini norðan úr Sundalagnum plaga at taka ís í Miðvági.

Tað er ivaleyst at gera í Miðvági í løtuni, letur virkisleiðarin at. Arbeitt verður hvønn dag, og eisini í dag verður arbeitt. Tað er annars ikki heilt vanligt at arbeiða leygardag. Í løtuni eru tað hýsa og upsi, tey hava á borðinum.

Albert Elelfsen hevur góðar vónir fyri árið. Tað tykist vea ríkiligt til av fiski. Øllum fiskaløgum, heldur hann. Tað ger so eisini, at prísurin eru nakað lækkandi.

Tá mest er at gera, arbeiða umleið 120 fólk á Føroya Fiskavirking í Miðvági.

Tillukku til tín

Tað flaggaði uttan fyri barnagarðin í Sørvági, tá Sosialurin kom fram við hósdagin. Barnagarðurin fylti

FØÐINGARDAGUR

Børnini fingu køkuhús og annað góðgæti, tá barnagaðrurin í Sørvági hevði føðingardag

Mynd: Edvard Joensen

Sørvági: Barnagarðurin Sýsln í Sørvági fylti átta ár hósdagin. Dagurin varð hildin við fløggum og køkuhúsum til børnini.

Tað flaggaði bæði uttan fyri og inni á barnagarðinum. Tey hildu føðingardag og sungu fyri barnagarðinum.

Tey sótu kring borðini við koppum og krússum og ótu av køkuhúsunum, sum bakarin júst hevði verið við. Onkur hevði fingið okkurt sætt í munnin eisini. Men tað varð alt lagt til viks, meðan sungið varð fyri blaðmanninum, sum kom at taka mynd.

– Vit fara til Bíggjars at sígga neytini, greiddi ein spentur drongur frá, tá liðugt var at eta. Hann skundaði sær. Neytini lokkaðu, og hann hevði ringa tíð.

Tað ganga 40 børn í barnagarð í Sørvági. Tó eru summi teirra í hálvdagsplássi. Umframt hevur Sørvágs Kommuna eisini dagrøkt.

ej

Tjóðveldislistin liðugur

Norðurstreymoyar Tjóðveldisfelag hevur stillað somu fýra valevni upp, sum uppstillað vórðu til seinasta løgtingsval

UPPSTILLING

Valevnislistin hjá Norðurstreymoyar Tjóðveldisfelag til løgtingsvalið er liðugur.

Felagið hevur stillað fýra valevni upp, og eru tað tey somu, sum stillað vórðu upp til seinasta løgtingsval.

Valevnini, sum eru á tjóðveldislistanum í Norðurstreymoy, eru hesi:

Jógva Durhuus, løgtingsmaður, Vestmanna
Heini Holm, borgarstjóri, Kvívik,
Sunniva Kollslíð, skrivstovukvinna, Streymnesi og
Niklái Petersen, skipari, Kollafirði.

Tjóðveldisflokkurin gjørdist størsti flokkur í Norðurstreymoyar valdømi á seinasta løgtingsvalinum, sigur felagið í tíðindaskrivi. Ta ferðina fekk Tjóðveldisflokkurin 599 atkvøður í Norðustreymoy.

ej